# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Johanna Maria Olsen, Vágur 100 ár

Fríggjadagin 17. mars verður mamma (fosturmamma) mín, 100 ár. Tað er ikki til at fata, at tú er blivin so gomul, men tað besta av øllum er, at minnið hevur tú so gott enn.

Er tað nakað eg ikki minnist, so ringi eg bara til tín, og tað er altíð eitt svar.

Eg minnist sum tað var í gjár, tá langabbin kom við mær inn til Vágs, eg var 4 1/2 ára gomul tá, eitt stórt trauma fyri eitt barn at koma til fremmand fólk, men við tínum og Sámalsa kærleika til børn, var tað tað besta fyri meg. Eitt betur heim kundi eg ikki koma í. Eg havi so nógv gott at takka tykkum fyri, og nógv góð minnir havi eg heimanífrá.



Sum tá je kom heim frá skúla leygardag, tá hevði tú altíð gjørt reint, stívað gardinur og dúkar, men tað besta var kakan, tú bakaði (trumfurin). Enn tann dag í dag, stendur tað klárt fyri mær. Ella á jólum. Tá í tíðini vóru ikki so nógvar gávur, men tú goymdi altíð eina gávu til 1. jóladag, til stóra gleði fyri meg. Eg kundi skrivað síðu upp og síðu niður, um øll tey góðu minnini, men eg vil heldur snakka við teg um tað, sum vit so mangan hava gjørt.

Eg havi altíð sagt Gumman. Tað kom av at tá Óla Jákup búði hjá okkum, segði hann altíð Gumman. Bara man segði hjá Gummuni, so vistu øll hvør tað var. Eg veit at tað er ein stór gleði fyri teg, hvørja ferð Óla Jákup og tey vitja teg.

Tú hevur altíð verið so góð við øll og er kend fyri at vera tolin og góð. Eg havi ongantíð sæð teg illa. So eg segði einaferð við teg: »Hvussu ber tað til, at tú ongantíð blívur ill«, og tú svaraði: »Hvat nyttar at rópa ella blíva illur, tað førir aldrin til nakað gott«. – So satt, sum sagt.

Góða Gumman, takk fyri alt tú hevur verið fyri okkum øll, eg havi so nógv gott at takka tær og Sámali fyri, at tit hava tikið tykkum so gott av Sámal Paula. Eitt betur heim kundi hann ikki fáa, eg kann aldrin takka nokk.

Góða Gumman, eg, maður mín, børnini og langommubørnini, ynskja tær hjartaliga tillukku á 100 ára degnum. Vit ynskja tær ein óforgloymandi dag. Vit elska teg, og Gud vælsigni teg.

**Lydia**

Her eru nøkur vers, sum Jákup skrivaði, tá tú bleiv 98 ár, tey passa so gott til tín:

*Í Toftalíð søgdu øll,*
*Gumman, góð,*
*hvørt mansbarn har*
*soleiðis segði,*
*tú góðlynt var og bleiv*
*aldrin óð,*
*alt gott tú í okkum legði.*

*Teim 100 tú nærkast, so*
*mensk tú er,*
*ei bilar við tínum minni,*
*hvørt smáting tú minnist,*
*nógv betur enn vit,*
*nú stákast tú einamest inni.*

*Gumman, vit takka fyri alt*
*tað, vit frá tær hava nomið,*
*tað, tú hevur fyri okkum*
*foralt,*
*og alt, sum frá tær komið.*

*Roðin í vestri um sólina*
*sær,*
*Guð signi tær seinastu løtur.*
*Føðingardagin øll heilsa*
*tær,*
*Føroyalands synir og døtur.*

Hjartaliga tillukku á 100 ára degnum, góða Gumman.

## Andlát og jarðarferðir

**Magnus Ennistíg, Klaksvík**, andaðist týsdagin 14. mars á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, 80 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni

**Lena Thomsen í Króki, Hvalba**, andaðist mikudagin 15. mars 94 ára gomul. Farið verður úr Kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjadagin 17. mars kl. 19. Jarðarferðin verður úr Hvalbiar kirkju leygardagin 18. mars kl. 14. Tey ið vilja minnast Lenu, kunnu lata eina gávu til Hvalbiar Missiónshús, konto í Føroya Banka

**Jóhan Christan Dam, málarameistari, vanliga nevndur Hannekis, ættaður úr Porkeri**, búsitandi í Havn, andaðist í nátt 16. mars, 71 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Kistan við Karl Mortensen**, Toftalíð í Vági, fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjadagin kl. 16. Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Karl, kunnu lata Missiónshúsinum í Vági eina peningagávu. Konta í Suðuroyar Sparikassa.

Kistan við **Randi Kristensen á Tvøroyri** fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjadagin 17. mars kl. 18. Jarðarferðin verður úr Tvøroyar kirkju leygardagin 18. mars kl. 13. Tey, ið vilja minnast Randi kunnu lata eina peningagávu til Føroya felag móti Krabbameini. Konta í peningagstovunum.

Kistan við **Jónhild Henriksen** fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi heim í Kristianskirkjuna í kvøld kl. 18. Jarðarferðin verður fríggjadagin klokkan 13:30 úr Kristianskirkjuni.

## Felagið Vágar fingið nýggja heimasíðu

**Felagið Vágar/Vága Kunningarstova hevur fingið nýggja heimasíðu, sum sæst á adressuni www.vagar.fo**

TÍÐINDASKRIV

Felagið Vágar, sum rekur Vága Kunningarstovu, lat mikudagin upp nýggja heimasíðu, sum sæst á www.vagar.fo.

Tað er lýsingarstovan Sansir, sum hevur ment heimasíðuna, og hon er bygd upp á sama hátt sum tær heimasíðurnar, Sansir frammanundan hevur latið úr hondum. Nevnast kunnu til dømis heimsíðurnar hjá Sørvágs- og Sandavágs kommunum.

Heimasíðan www.vagar.fo er í høvuðsheitinum ein ferðavinnusíða, sum tó er ætlað allari vinnu sum heild í Vágum og Mykinesi.

Á síðuni ber til at síggja, hvørji ferðavinnutilboð eru í Vágum og Mykinesi, og síðan verður loypandi dagførd og ymiskt lagt afturat, so sum møguleiki fyri savnsvitjanum, matstøðum, nátthúsum o.s.fr.

Eisini er síðan ætlað sum ein tíðindasíða, har ymiskt, sum fyriferst í Vágum verður lýst við tíðindavinkli. Alt í alt er heimasíðan www.vagar.fo ætlað sum ein uppslagstalva, har tiltøk í Vágum og Mykinesi verða lýst.




*Heimasíðan www.vagar.fo er í høvuðsheitinum ein ferðavinnusíða, sum tó er ætlað allari vinnu sum heild í Vágum og Mykinesi*




### Dagurin í morgin

**17. mars Geirtrúð**, deyð 659. Dóttir Pippin eldra og abbasystir Karlamagnus. Fór ung í kleystrið Nivelles í Belgia og gjørdist eisini abbadissa har. Millum annað var hon verndari hjá ferðandi fólki, og við vegirnar nógvastaðni í Europu vórðu bygd sanktugeirtrúðtilhald, har tey ferðandi og tey fátækastu kundu fáa hjálp. Við hesi tilhald vórðu sett upp vakurt málaðar træmyndir av Sanktu Geirtrúð við gyltari krúnu. Av veðri og vindi fóru málingin og gyllingin av hesum myndum, og av tí kemur tiltakið, at "ljómin er farin av Sanktu Geirtrúð". Undir hesum býr kanska eisini tað, at teir gomlu søgdu, at var regn geirtrúðardag, fór at vera regnsummar.

Navnið er týskt, samansett av orðunum spjót og styrki.